# Løgreglu-tíðindi úr Klaksvík

## Lyklarnir stóðu í bilinum

Fríggjamorgunin kl. 7 – tað er: áðrenn Norðoyastevnan byrjaði – varð ein bilur stolin í nánd av politistøðini í Klaksvík. Sambært løgregluni hevði onkur sett bilin frá sær við lyklunum í, av teirri einfaldu orsøk at onkur annar skuldi koma eftir bilinum stutt eftir. Tá viðkomandi skuldi fara avstað við bilinum, var eingin bilur har, tí ein triði persónur var farin avstað við honum gjøgnum Norðoyatunnilin. Bilurin varð seinni funnin í Havn.

## Visti ikki hvussu hann kom til býin

Tíðliga leygarmorgunin tók løgreglan ein mann sum koyrdi ávirkaður. Promilla hansara vísti 1,42. Nakað seinni fekk løgreglan fatur á einum øðrum manni úr Eysturoynni, har illgruni eisini var um rúsdrekkakoyring. Hesin maðurin var komin við bili sínum gjøgnum Norðoyatunnilin úr heimbygdini, ikki langt frá tunlinum. Men, hvussu hann bilurin var komin til Klaksvíkar, visti maðurin ikki.

## Svóvu rúsin av á støðini

Løgreglan í Klaksvík hevur fleiri ferðir verið eftir fólki, sum annaðhvørt vóru avdottin ella gjørdu øðrum ónáðir í rúsi. Í einum føri vóru menn vorðnir rættiliga ósamdir uttanfyri Barok. Evnið teir keglaðust um var fótbóltur. Nakað seinni kom løgreglan fram á ein mann, sum lá avdottin fram við vegnum. Í øðrum førum hava fólk gjørt smærri herverk á bilar.

## Nakin á rundkoyringini

Klokkan var fáar minuttir í hálvgum eitt í nátt, tá løgreglan fekk fráboðan um ein mann sum rann nakin á rundkoyringini til Norðoyatunnilin. Tá teir komu á staðið kundu teir staðfesta, at ein maður rann íkring her, bert ílatin undirbuksur. Hann var ávirkaður av rúsdrekka og varð tikin inn á støðina at sova rúsin av sær. Í morgin varð hann latin leysur aftur

## Húsaófriður í morgun

Seinasta punktið á døgnfrágreiðingini hjá løgregluni í Klaksvík kom kl. 04:51 í morgun. Tá ringdi ein kona til løgregluna og boðaði frá húsaófriði í hennara egna heimi: Hon og maðurin vóru komin til ilnar um okkurt. Sum skilst er hetta ikki fyrstu ferð at fráboðanir av slíkum slagi koma úr hesum staði. Løgreglan fór á staðið og tosaði tey til rættis.



*Í góðveðri ber alt til – ikki minst at grilla.*
*Mynd: Høgni Thomsen*

## Ein góður dagur úti í Grøv

Fríggjadagin vóru 25 ár liðin síðani Føroya Pedagogfelag sá dagsins ljós.

Hetta varð sum vituligt er markerað í felagshølunum í Havn, men eisini aðrastaðni kring landið.

Í Klaksvík høvdu dagstovnarnir fyrireikað ein barnadag úti í Grøv, bæði fyri tey sjálvi og fyri foreldrini. Hetta tiltakið eydnaðist eisini sera væl – ein góð upptaka til Norðoyastevnuna.

*sb.*


Keypssamtøkan í Vágum

FK í Vágum søknast eftir

**2 fólkum til deildina í Sandavági**

**at byrja 2. juli ella eftir nærri avtalu**

**Arbeiðstíð:** Um 20-25 tímar um vikuna

**Vit rokna við, at tú**

- ert røkin
- ert blídlig/ur av lyndi
- ert álítandi
- ert lagalig/ur
- trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum

**Løn:** Sambært S&K sáttmálanum

Umsókn skal vera okkum í hendi innan 16. juni 2007, ella skjótast til ber

Send nøkur orð um teg sjálva/n til:

**FK Vágar**
**FO 370 Miðvági**
**Att.: Álvur Samuelsen**
**Tel 33 29 50 - 22 11 30**

ella sum teldupostur til: as@fk.fo

Keypssamtøkan í Vágum

FK í Vágum søknast eftir

***Handils-lærlingi til deildina í Miðvági***

at byrja 2. juli ella eftir nærri avtalu

**Krøv um útbúgving**

- FHS - 3 ára lærutíð
- HH - 2 ára lærutíð
- Student ella HF - 2 ár og 18 vikur

Vit bjóða einum drongi ella einari gentu, við dirvi og áræði, eina útbúgving undir skipaðum viðurskiftum, í einum handli, sum lív er í

**Arbeiðstíð:** 40 tímar um vikuna, frí annan hvønn leygardag

Nakrar ferðir í lærutíðini verður farið á skeið í Danmark

**Okkara krøv:** Tú skalt vera fyrikomandi, kundavinarlig/ur, røkin, hevur góð samstarvsevni

**Løn:** Sambært S&K sáttmálanum

Aðrir upplýsingar fáast við at ringja til 332950 ella 221130 og spyrja eftir Álvi Samuelsen

**Umsókn:** Skrivlig umsókn, merkt *Lærlingur,* skal í seinasta lagi 23. juni 2007, saman við próvtøkuskjali sendast til

**FK Vágar**
**FO 370 Miðvági**
**Att.: Álvur Samuelsen**
**Tel 33 29 50 - 22 11 30**

ella sum teldupostur til: as@fk.fo